# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Í 2004 fekk Bush stuðul frá ríkum oljumonnum. Ta hjálpina fær McCain ikki, og tað svíður*

*amerikanskt blað*

# 250.000 gjørdust heimleys í illveðri

Í eina viku hevur tropiskt illveður herjað miðamerikonsku londini Costa Rica, Honduras, Guatemala, Nicaragua og El Salvador. Myndugleikar og hjálparfólk siga, at minst 39 fólk eru deyð í illveðrinum. Næstan 10.000 hús eru oyðiløgd, og umleið 250.000 fólk eru vorðin heimleys. Veðurmenninir siga, at illveðrið er tað ringasta í Miðamerika síðani tropisku ódnina Mitch, sum herjaði leiðirnar í 1998, og sum kravdi næstan 20.000 mannalív.



# Fíggjarkreppan rakar Eysturevropa meint

**Fíggjarkreppan hevur rakt fleiri lond í Eysturevropa so meint, at tey eru um at fara av knóranum**

Tað eru ikki bara bankar og íleggjarar í ídnaðarlondunum, sum líða undir fíggjarkreppuni. Í fleiri londum í Eysturevropa ger kreppan eisini um seg, og í summum londum er støðan so álvarssom, at fáa tey ikki hjálp uttaneftir, kann alt enda í ruðuleika og húsagangi.

- Okkara gjaldoyra er undir ógvusligum trýsti, og okkurt má gerast fyri at bjarga okkara búskapi, segði ungarski forsætisráðharrin, Ferenc Karvalits, tá hann í gjár boðaði frá, at Ungarn hevur biðið Altjóða Gjaldoyragrunnin (IMF) um hjálp.

Beint frammanundan hevði ungarski tjóðbankin hækkað rentuna 3,0 prosentstig upp í 11,5 prosent fyri at verja landsins gjaldoyra.

Í Hvítarusslandi hevur tjóðbankin havt samband við IMF um hjálp, og í Ukraina væntar stjórnin at fáa játtandi svar frá IMF í næstu viku upp á eina umsókn um hjálp.

Fíggjarkreppan hevur eisini rakt Russland meint, men Igor Shuvalov, varaforsætisráðharri, sigur við Financial Times, at viðurskiftini í bankakervinum eru við at koma aftur í rættlag. Hann ásannar, at rentan er í hægra lagi, men sigur, at hon er á veg niðuraftur, og at bankarnir aftur eru sinnaðir at fíggja vinnulívið.

- Men tað fer at taka tvær ella tríggjar vikur, áðrenn alt kemur í rættlag, sigur Shuvalov við bretska blaðið.

# Obama á odda í fýra ivastatum

**Barrack Obama hevur lagt seg á odda í fýra av fimm fyrrverandi republikonskum statum**



*Barrack Obama er á odda í teimum flestu kanningunum*

*Mynd: Polfoto)*

Sambært einari nýggjari meiningakanning hjá sjónvarpinum CNN er Barrack Obama framman fyri John McCain í statunum Nevada, North Carolina, Ohio og Virginia. Felags fyri hesar statirnar er, at í 2004 vann republikanarin George W. Bush í øllum fýra.

CNN sigur, at eydnast tað Obama at vinna í teimum fýra statunum og teimum statunum, sum floksfelagin hansara John Kerry vann í í 2004, vinnur Obama forsetavalið 4. november.

Eftir kanningini hjá CNN er Obama millum 5 og 13 prosentstig frammanfyri í Nevada, millum 4 og 7 prosentstig í North Carolina og Ohio, og í Virginia er hann millum 7 og 12 prosentstig framman fyri McCain. Í West Virginia er McCain frammanfyri við millum 7 og 12 prosentstigum. Her vann George W. Bush við 13 prosentstigum fyri fýra árum síðani.

Sjónvarpið Fox ger eina landsumfatandi meiningakanning um dagin, nú valið nærkast, og eftir teirri nýggjastu er Obama 9 prosentstig framman fyri McCain við 49 prosentum ímóti 40. Tað samsvarar rættiliga væl við eina tilsvarandi kanning hjá sjónvarpinum NBC og blaðnum Wall Street Journal, tí hon gevur Obama 52 prosent og McCain 42. Hinvegin vísir ein kanning hjá tíðindastovuni AP, at Obama er bara eitt prosentstig frammanfyri.

## STUTT SAGT

### Al Fayed sagdur vera ov næskur

Ríkmaðurin Mohamed al Fayed, sum eigur tað kenda Harrods-handilhúsið í London, var í gjár til avhoyringar hjá løgregluni, tí hann er meldaður fyri at hava borið seg ósømiliga at ímóti einari 15 ára gamlari gentu. Við sær hevði hann ein sakførara.

Tíðindastovan Sky skrivar, at Mohamed al-Fayed slapp aftur til hús aftan á avhoyringina, men løgreglan hevur kortini boðað frá, at kanningarnar í málinum halda fram. Løgreglan vil ikki siga, hvat fyri ósømiligan atburð tann kendi handilsmaðurin skal hava brúkt. Hon sigur bara, at talan er um ein tilburð, sum var fyri fimm mánaðum síðani.

Bretska blaðið Daily Mail sigur seg hava fingið at vita frá sínum keldum, at Mohamed al-Fayed er meldaður fyri kynsligan ágang ímóti teirri 15 ára gomlu gentuni. Blaðið skrivar, at gentan hitti al-Fayed inni í handli hennara í mai, og at hann bað um telefonnummar hennara. Sambært blaðnum hittust tey seinni, og tá skal al-Fayed hava verið ónærisligur ímóti henni, skrivar Daily Mail.

Mohamed al-Fayed var pápi Dodi al-Fayed, sum var unnusti Dianu prinsessu, og sum doðyi saman við henni í ferðsluvanlukkuni í París.

### Fossar hava stóran áhuga

Næstan hálv onnur millión fólk hava verið og hugt at fýra fossum, sum íslendski listamaðurin Ólafur Elíasson hevur gjørt í East River í New York. Sambært býarmyndugleikunum hava teir nógvu áskoðararnir lagt umleið 70 milliónir dollarar eftir seg.

Teir fýra fossarnir eru tað størsta listarverkið, sum kommunan í New York hevur latið gera, og borgarstjórin í býnum, Michael Bloomberg, sigur við fjølmiðlarnar, at verkætlanin hevur roynst betur enn væntað. Upprunaliga roknaði kommunan við, at áskoðararnir fóru at legja einar 55 milliónir dollarar eftir seg, men tað talið er sum nevnt væl størri.